# Dreymurin er ein fótbóltshøll



- *Tað, sum eg segði um samskiftið millum feløgini og FSF, skal endiliga ikki misskiljast, og tað er fullkomuliga burturvið, at eg skal leggja eftir nøkrum í hesum sambandi, sigur Dánjal Andreasen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Nýggi fótbóltsbossurin í Føroyum, Dánjal Andreasen, hevur stórar ætlanir. Innanhýsir vil hann hava sambandið at rigga betri, og so hevur hann eisini ein dreym um, at føroyingar í framtíðini eisini kunnu spæla fótbólt um veturin**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

- Og soleiðis skiftu teir Torleif Sigurðsson út eftir einum minutti – ella einum hálvum.

Soleiðis tók orðstýrarin á aðalfundinum hjá FSF, Jógvan Arge, heldur skemtandi til, tá Dánjal Andreasen uttan atkvøðugreiðslu varð kosin at vera nýggjur formaður í Fótbóltssambandi Føroya leygardagin.

Hóast hetta gekk bæði skjótt, væl og lætt fyri seg, so er tað neyvan nøkur løtt uppgáva, sum nýggi formaðurin hevur fingið, nú hann skal stjórna fótbóltinum í Føroyum komandi tvey árini, og kanska nakað væl afturat.

### Skal ikki misskiljast

Tað tykist heldur ikki, sum um nýggi formaðurin hevur roknað við eini serliga lættari uppgávu, og hesar seinastu mánaðirnar hevur hann eisini gjørt sær nakrar tankar um, hvussu hann kundi hugsað sær, at FSF varð rikið.

Eitt, sum hevur verið nógv frammi hesa seinastu vikuna, er, at Dánjal Andreasen í samrøðu við Útvarpið bar fram, at eftir hansara tykki átti samskiftið ímillum FSF og føroysku feløgini at betrast. Hetta er follið nógvum fyri bróstið, og spurnartekin hava verið sett við, hvat nýggi formaðurin hevur meint við hesum. Leggur hann eftir fráfarandi formanninum fyri væntandi samskifti, ella leggur hann eftir nevndini, har hann sjálvur hevur verið virkin í 15 ár? Vit hava sett nýggja formanninum spurningin.

- Nei. Ætlanin hjá mær við hasum úttalilsinum hevur ongan tíð verið at lagt eftir Torleif. Vit hava ígjøgnum nógv ár havt eitt gott samstarv, og eg havi onga sum helst orsøk til at leggja eftir fráfarandi formanninum, er fyrsta staðfestingin hjá Dánjali Andreasen um hetta.

- Tað er bara soleiðis, at seinastu tíðina hevur onkun tíð verið graml at hoyrt um, at samskiftið ikki hevur verið nóg gott. Er tað veruliga soleiðis, so mugu vit hyggja eftir, hvat vit kunnu betra í hesum sambandi, og sum so skal hetta ikki skiljast øðrvísi enn tað sama.

- Tað var í hesum sambandi, at eg nevndi, at ein møguleiki kundi verið ein árligur fundur við formenninar í feløgunum, har vit viðgjørdu teir lutir, sum nú vóru uppi í tíðini. Hetta er framvegis ein loysn, sum eg gangi inn fyri, og tað er so eisini ætlanin hjá mær, at slíkri fundir skulu vera fastir tættir framyvir, sigur Dánjal Andreasen.

- Tað eigur jú ongan tíð at vera soleiðis, at feløgini ikki kunnu til FSF við kritikki. Nakað sum feløgini annars hava tókst at verið bangin um, tí hetta møguliga kundi skaða tey í aðrar mátar. Tað er jú soleiðis, at tað eru feløgini, sum eiga FSF. Vit eru her fyri at umboða feløgini og ikki sum ein mótpartur.

- Tað, sum eg segði um samskiftið millum feløgini og FSF, skal endiliga ikki misskiljast, og lat meg enn eina ferð sláa fast, at tað er fullkomuliga burturvið, at eg skal leggja eftir nøkrum í hesum sambandi, sigur Dánjal Andreasen.

Spurdur, hvørt tað eisini eru aðrir lutir, sum hann hevur ætlanir um at broyta innanhýsis í FSF, heldur Dánjal, at kanska er tørvur á onkrum broytingum í nevndararbeiðinum.

- Eitt nú hava vit hoyrt uttanífrá, at feløg hava verið misnøgd við arbeiðið hjá kappingarnevndini í fjør, og er tað so, so skal hetta betrast, men hetta hongur so eisini saman við tí, sum eg havi nevnt um samskiftið.

### Tórsvøllur

Eitt av teimum málum, sum í løtuni tykjast sera aktuel, er liðugtgerðin av bygninginum við Tórsvøll. Ein bygning, sum FSF higartil hevur nýtt sjey milliónir til, og sum eftir ætlan fer at kosta sambandinum aðrar tvær milliónir. Hvørja áskoðan hevur nýggir formaðurin hesum viðvíkjandi.

- Her er mín fatan stórt sæð hin sama, sum hjá fráfarandi formanninum. Vit hava sum er nýtt sjey milliónir, og skal nytta fáast úr hesum, má bygningurin gerast liðugur.

- Eg kann leggja afturat, at tær báðar milliónirnar, sum aðalfundurin nú hevur givið heimild at nýta, eru maksimum fyri, hvat hetta kann kosta FSF. Mær hevði sjálvandi dámt best, um vit á komandi aðalfundi kundu víst á, at vit einki høvdu nýtt av hesum, men tað fáa vit at síggja.

- Sum sagt, so meti eg tó, at vit eiga at fáa gjørt bygningin lidnan. Málið skal loysast, so Tórsvøllur kann fáa endaliga góðkenning, og skilnaður eigur at gerast millum húsið, sum FSF skal eiga, og vøllin.

### Skulu hava fótbóltshøll

Aloftast er tað so, at nýggir leiðarar koma við nýggjum ætlanum, og soleiðis er eisini við Dánjal Andreasen. Tí tá vit at enda spyrja hann, hvørt hann hevur nakrar ítøkjuligar ætlanir fyri, hvat næsta stigið hjá føroyskum fótbólti er, er hann skjótur at svara.

- Tað er neyðugt hjá føroyskum fótbólti at vit fáa eina fótbóltshøll. Skal ein framhaldandi menning vera, er neyðugt, at vit eisini fáa spælt um veturin.

Hetta er ikki nakað, sum hevur verið umrøtt á fundum hjá FSF áður, men kortini tykist nýggir formaðurin ikki at halda, at hetta er nakað, sum liggur alt ov langt frammi í tíðini.

- Nú dugi eg ikki at siga, akkurát, hvar ellla hvussu ein slík høll skuldi verið gjørd, men tað er av stórum týdningi at hon kemur, og at hon liggur soleiðis fyri, at so stórur partur sum gjørligt av landinum fær gleði av henni. Ein møguleiki kundi kanska verið at innilokað vøllin á Toftum.

Um fíggingina av slíkum vølli, sigur formaðurin, at UEFA letur stuðul til slíkar ætlanir, so talan verður als ikki um eina íløgu upp á tíggjutals milliónir, sum Fótbóltssambandið skal gera, sigur hann.

Um stutta tíð skulu føroyingar annars til Íslands, har ein slík høll skal takast í nýtslu. Sjálvur hevur Dánjal í drúgt áramál verið limur í landsliðsnevndini hjá FSF, og hann útilokar ikki, at hann verður við á hesi ferðin.

- Tað kann væl vera, men vit hava eisini áður spælt í slíkari høll. Bæði í Finnlandi og í Svøríki varð dystur leiktur innandura. Talan var um graslíkisvøllir við sandi í, sum væntandi verða góðkendir av UEFA, og tað riggaði heilt væl.

- Mín vón er so tann, at slíkir dystir eisini verað gjørligir um ikki so langa tíð her hjá okkum, sigur nýggi føroyski fótbóltsbossurin at enda.

## Nýggi bossurin

Dánjal Andreasen
48 ára gamal leirvíkingur
Útbúgvin maskinmeistari
Giftur Hannu, og saman hava eiga tey trý børn. Jørgin, Berint og Edith
Nevndarlimur í FSF í 15 ár. Øll árini sum limur í fíggjarnevndini og 12 ár sum formaður í kapingarnevndini.



# Nú er TB eisini føroyameistari

**Tvørágentur staðfestu føroyameistaraheitið við at vinna ein tryggan 3-0 sigur móti Fleyr í Gundadalshøllini leygardagin. Mjølnir vinnur silvur, men spurningurin um bronsuna stendur enn ósvaraður**




*Fagnaðurin var sjálvandi øgiligur, tá dysturin var liðugur, og skríggj, klemm og annað, sum hartil hoyrir, vórðu sett á skránna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Mjølnir greiddu sína skyldu við at vinna á Drátti, men hetta munaði tó lítið*

*Mynd: SáH*

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Í 1987 bleiv TB føroyameistari í fótbólti. Tá mundi neyvan nakar gruna, at tað skuldu ganga heili 15 ár, áðrenn eitt lið av Tvøroyri aftur skuldi gerast føroyameistari. Og enn minni kundi nakar gita, at tað næsta føroyameistaraheitið skuldi koma í kvinnuflogbólti.

Men leygardagin hendi tað so, at kvinnurnar hjá TB – í 1987 vóru tær flestu av teimum enn ikki farnar at ganga í skúla – vunnu føroyameistaraheitið, og tað er fyrstu ferð nakrantíð, at TB hevur verið føroyameistari í flogbólti.

Hetta varð veruleiki, eftir at liðið vann 3-0 móti Fleyr í Gundadalshøllini. Mjølnir kann enn taka TB aftur í stigum, men tær fáa einki gjørt við settmunin, og tí er kappingin avgjørd, hóast bæði liðini enn hava tveir dystir eftir at leika.

Fleyr hevur ligið niðast meginpartin av kappingini, og tað varð ikki roknað við, at tær fóru at gera nakað serligt við TB-liðið. Og Fleyr fekk eisini kærleikan at kenna frá nýklaktu steypavinnarunum. 25-13, 25-22 og 25-12 er ein sera tryggur 3-0 sigur, og tá seinasti bólturin varð vunnin, kundu TB-kvinnurnar annað vikuskiftið á rað fegnast um gull. Fyrst var tað steypafinalan, og nú var tað so landskappingin.

### Málið er rokkið

Tað sum hendi leygardagin, var bara staðfestingin av tí, sum leingi hevur ligið í luftini. Heilt frá byrjan setti TB seg á oddasessin, og tær sleptu honum ongantíð aftur. Tær snávaðu á heimavølli móti Mjølni í grundspælinum, men síðani tá hava tær bara hugt frameftir, og avgerðin fall í roynd og veru longu fyri einum mánaði síðani, tá tær vunnu heima móti Mjølni í endaspælinum.

Venjarin Virgar Djurhuus sigur, at tað sjálvandi kennist sera væl, nú liðið hevur vunnið bæði steypafinaluna og meistaradeildina. Hetta er tað, sum felagið setti sær fyri áðrenn kappingin byrjaði, og sigast má, at tað hevur gingið uppá stás.

–Vit fingu tveir góðar útlendskar leikarar afturat okkum, og vit vóru ikki bilsin av at fáa eina so góða byrjan uppá kappingina. Men eg má siga, at eg var eitt sindur meira ivasamur, eftir at vit mistu venjaran og annan leikaran stutt inni í kappingini, sigur Virgar, sum sjálvur yvirtók venjingina aftaná at italski venjarin fór av landinum.

Hann heldur, at útlendsku leikararnir høvdu stóran týdning í byrjanini av kappingini, men at teirra týdningur minkaði í seinnu helvt, tá hinir leikararnir tóku størri ábyrgd.

–Tær eru sera ungar, men tær hava spælt saman síðani tær vóru um sjey ára aldur, og tað er ein av høvuðsorsøkunum til, at tað hevur gingið so væl sum tað hevur. Tær semjast væl, ikki bert á vøllinum, men eisini uttanfyri vøllin, og tað hevur týdning. Og tá vit so eisini fingu Gudrid Nolsøe við til teir seinastu dystirnar, var tað bara prikkurin yvir I´ið, sigur Virgar Djurhuus.

Áhugin fyri liðnum hevur verið stórur á Tvøroyri, serliga í seinastuni, nú meistaraheitið er komið nærri og nærri.

–Tað merkist, at fólk her eru sera glað um, at tað gongur so væl. Og tað er ikki bara á Tvøroyri, men í allari oynni, sigur Virgar, sum sjálvandi vónar, at hetta fer at økja enn meir um áhugan fyri flogbólti á staðnum.

Í Suðuroynni er tað blivið til tað, at kvinnurnar á Tvøroyri leika flogbólt, meðan kvinnurnar í Vági leika hondbólt. Mansflogbóltur er hinvegin eingin í Suðuroy, men TB hevur yngri lið í dreingjadeildunum, sum um nøkur ár kanska fara at taka táttin upp eftir kvinnunum.

Vit fara her at ynskja TB og suðuroyingum hjartaliga tillukku við meistaraheitinum og við »greipuni«.

### Sjáldsamur sigur til Fleyr

Áðrenn hetta vikuskiftið var Mjølnir einasta liðið, sum hevði nakran møguleika at køva meistaravónirnar hjá TB, men tann møguleikin var ikki serliga stórur. Men mjølnirkvinnurnar gjørdi sítt leygardagin við at vinna 3-1 móti Drátti í Klaksvík. Tvey tey fyrstu settini vann Mjølnir rættiliga lætt 25-12 og 25-17, men í triðja setti gjørdi Dráttur so ein vørr og vann 25-20. Men so setti Mjølnir alt upp á pláss í fjórða setti við at vinna 25-8. Annað árið á rað vinnur Mjølnir silvur, meðan Dráttur, sum vann gull í fjør, nú roynir eftir bronsuni.

Hesar royndirnar fingu tó eitt skot fyri bógvin sunnudagin, tá drátturkvinnurnar á heimavølli snávaðu móti Fleyr. Fleyr vann nevniliga tann dystin 3-2, og nú er tað knappliga ÍF, sum hevur bestu møguleikarnar fyri at enda á triðja plássinum. Dráttur — Marina Popovic sat uttanfyri við skaða — vann annars fyrsta sett móti Fleyr við heili 25-12, men so skiftust liðini um at vinna settini upp til 2-2. Í síðsta og avgerandi settinum vann Fleyr 15-8, og var hetta fyrsti sigur hjá fleyrkvinnunum síðani 22. desember, tá tær í fyrsta dystinum í endaspælinum vunnu 3-1 móti ÍF. Altso ein kærkomin og heldur sjáldsamur sigur til Fleyr, sum enn kann koma upp um Drátt á stigatalvuni. Men til tað krevst, at Fleyr vinnur móti Mjølni, samstundis sum Dráttur tapir móti ÍF. Spádómurin hjá okkum um, at júst dysturin millum Drátt og ÍF verður avgerandi fyri bronsuna, sær enn út til at halda. ÍF kann tryggja sær bronsumerkini, um tær vinna móti TB komandi vikuskifti, men tað er lítið sannlíkt. Tí eftir hvat skilst, so ætlar TB sær at vinna teir báðar írestandi dystirnar, sjálvt um tað ikki er neyðugt hjá teimum.

### Úrslitini um vikuskiftið:

Fleyr-TB 0-3
(13-25, 22-25, 12-25)
Mjølnir-Dráttur 3-1
(25-12, 25-17, 20-25, 25-8)
Dráttur-Fleyr 2-3
(25-12, 23-25, 25-19, 20-25, 8-15)

**Dystir eftir:**

| | |
|---|---|
| 3. | Mjølnir-TB |
| 6. | TB-ÍF |
| 9. | Fleyr-Mjølnir |
| 09.03. | Dráttur-ÍF |



*Fyri fyrstu ferð nakrantíð er TB nú føroyameistari í bestu flogbóltsdeildini. Hetta gjørdist veruleiki, tá tær vunnu útidystin ímóti Fleyr*

*Mynd: Álvur Haraldsen*